Byrjar at flúgva út frá München

Nýggja flogfarið hjá Atlantic Airways fór í gjár at flúgva fyri Lufthansa og kemur at hava høvuðsstøð í München. Tað er British Midland sum leigar flogfarið frá Atlantic Airways og so víðari til Lufthansa, og tí hevur flogafrið teir tiltiknu leðurstólarnar umborð, sum eru ein dreymur at sita í

Magni Arge handar Hans Meinhardi á Høgaból eina nál fyri at hava flogið yvir 10.000 tímar

Myndir: Jens Kristian Vang

ÓLAVUR Í BEITI

Tað var frálíkt lag á bæði starvsfólki og gestum seinnapartin fríggjadagin, tá ið nýggja flogfarið hjá Atlantic Airways hevði lent um 2-tíðina og seinni varð togað yvir í Hangarin hjá Atlantic Airways, har øll fingu høvi at vitja umborð á snotuliga flogfarinum, og eisini fáa sær ein forkunnugan bita frá føroyska flogfelagnum undir fagnaðarløtuni.

Tókst tú í hondina á starvsfólkunum og ynskti teimum til lukku, varð svarað uttan undantak: Í líka máta! Jú hetta var nýggja flogfarið hjá øllum føroyingum og tað vóru so mangir føroyingar komnir at fegnast um eisini saman við teimum, sum høvdu hetta til sítt dagliga arbeiðspláss.

Í røðu síni, segði stjórin, Magni Arge, at hetta var størsta løtan hjá felagnum og nú fóru eisini góðir møguleikar at vera fyri at menna flogferðsluna bæði úti sum heima hjá felagnum, nú nýggja flogfarið eisini er komið. Og hann nevndi, at longu sama kvøld klokkan 7, skuldi flogfarið avstað at flúgva fyri stóra evropeiska flogfelagið Lufthansa. British Midland hevur leigað frá Atlantic Airways og so víðari til Lufthansa, har tað skal flúgva út frá München til summarflúgvingin hjá Atlantic Airways byrjar í juni.

Og fórt tú í sjálvt flogfarið at vita, sást tú víst, at tað er eitt stórfelag, sum leigað hevur, tí teir 80 stólarnir í flogfarinum eru úr ljósgráum leðri, sum er eyðkennið hjá hesum stóra flogfelag. Hesir 80 stólarnir viga góð 300 kilo meiri enn vanligu stólarnir, sum Atlantic Airways brúkar.

Flogfarið hjá Atlantic Airways er bygt í 1985 og fleyg upprunaliga í USA. Tað er tvey ár eldri enn hitt flogfarið, men hevur flogið einar 10.000 tímar minni, og sambært Hans Hansen, flogskipara, er tað í avbera góðum standi. Seinastu árini hevur tað flogið fyri bretska felagið Debon Air. Fyrsta túrin síðan yvirtøkuna fleyg flogfarið 2. februar úr Stansted uttan fyri London, har tað hevur verið til eftirlit og umvæling, til Manchester.

Myndamaður blaðsins var eisini til staðar á flogvøllinum, tá ið nýggja flogfarið hevði sett seg, og vit lata myndirnar talað fyri seg.

Hans Hansen, yvirflogskipari, hevur verið við frá byrjan

Tó at nýggja flogfarið er eldri enn gamla flogfarið hevur tað flogið 10.000 færri tímar

Jóhan í Niðristovu, flogskipari og konan, Lis Eklund, stjóri á Hotel Føroyum, saman við Magna Arge, stjóra í Atlantsflog



Teir 80 leðurstólarnar eigur Lufthansa. Teir viga um 300 kg meira enn vanligu stólarnir hjá Atlantsflog

Magni Arge, stjóri, helt røðu við hátíðarhaldið í hangarinum fríggjadagin

Myndir: Jens Kristian Vang

Størsti dagur í føroyskari flogsøgu síðani 1988

- Hetta er eitt lop inn í altjóða flogferðslu, tí flogfarið skal í vinnu uttan fyri Føroyar 8-9 mánaðir av árinum, segði Magni Arge m.a. á stóru móttøkuni í Hangarinum, tá ið nýggja flogfarið var komið inn at standa

ÓLAVUR Í BEITI

Sum longu nevnt, var stórur dagur í Flogsøgu Føroya seinasta fríggjadag, tá ið nýggja flogfarið hjá Atlantic Airways kom til landið. Og tað var eisini ein fegin stjóri í felagnum, Magni Arge, sum lýsti løtuna í røðu síni og eisini framtíðina hjá felagnum sum nú hevði fingið fleiri vegnur at flúgva á.

M.a. segði stjórin, at við einum flogfari aftrat kom at verða skapt sunnari og tryggari grundarlag fyri framhaldandi menning loftvegis í ferðslukervinum til og úr Føroyum, og er hetta úrslit av hepnu royndunum við tveimum flogførum seinastu tvey summrini.

»Dry lease« avtala

- Við hesum flogfarinum aftrat gera vit eitt lop inn í altjóða flogferðslu, tí flogfarið skal í vinnu uttanfyri Føroyar stóran part av árinum, einar 8-9 mánaðir.

- Vit hava gjørt eina »dry-lease«(flogfar uttan manning) avtalu við British Midlands í 4 mánaðir, men tað er einki at ivast í, at tað kann gerast til eina »wet-lease« (flogfar við manning) avtalu, sum eru tveir av handilsmøguleikunum í dag, umframt charter flúgving.

- Eg vóni, at um 5 ár er virksemið í felagnum bygt helvt um helvt á heimamarknaði og útlendska marknaðin og tað krevur nógva av starvsfólki og felagi at laga seg til altjóða kapping, men vit hava gott treysti kortini, segði stjórin Magni Arge.

Trívast í kapping

Og um felagið og starvsfólkini, vísti Magni Arge á, at bæði felag og starvsfólk hava øll árini trivist í kapping, og fyrstu royndirnar í altjóða flúgving hava vit í flúgving til m.a. Sarajevo og Grønland, og nógv orka er løgd í arbeiðið at fáa nýggja flogfarið hendavegin, har tveir mans hava verið burturi í ein mánað at skipa fyri øllum.

- Hetta er eitt gott flogfar í góðum standi, kundi ein fegin stjóri at enda boða frá, tó at tað er eitt sindur eldri enn hitt flogfarið hjá Atlantic Airways. Men innan flogfør er tað meiri tímarnir í luftini sum telja heldur enn árini á jørðini.

Finnbogi Niclasen, flogvallarstjóri, helt eisini vælkomurøðu

Greiðar reglur og krøv til virksemi fjølmiðlanna

– sum bæði kunnu tryggja fjølmiðlunum sína óheftu støðu og sum kunnu tryggja einstaklingar og samfelagsbólkar móti órættari viðferð í fjølmiðlunum, sigur Høgni Hoydal m.a. í viðmerkingunum til uppskot um fjølmiðlalóggávu

ÓLAVUR Í BEITI

Høgni Hoydal sigur endamálið við uppskotinum verða, at mæla Løgtinginum til at taka støðu av nýggjum í málinum um at seta ríkislóg um fjølmiðlaábyrgd í gildi fyri Føroyar. Og orsøkin til tað er, at danska Løgmálaráðið ikki er sinnað at gera allar tær broytingar í lógini, sum Løgtingið samtykti í 1997. Í tí sambandi hevur Høgni Hoydal endurskoðað alt málið og er komin til hesar niðurstøður, sum landsstýrið tekur undir við:

Og niðurstøðurnar eru: At biðja Løgtingið um undirtøku fyri at heita á ríkismyndugleikarnar um at steðga málinum. Og at landsstýrismaðurin ístaðin leggur uppskot fyri tingið um føroyska lóg um fjølmiðlaábyrgd.

Viðvíkjandi gongdini í málinum, sigur landsstýrismaðurin, at málið er dømi um eina sera stirvna og lítið haldgóða skipan fyri lóggávu í Føroyum.

– Tað er hálvt triðja ár síðani, at Løgtingið samtykti ríkislógartilmælið um fjølmiðlaábyrgdarlóg. Síðani hevur málið ligið hjá donskum myndugleikum, uttan at lógin er sett í gildi. Nú verða so úr Løgmálaráðnum reistir ymsir prinsippiellir trupulleikar við tilmælinum, og Løgmálaráðið boðar frá, at lógin ikki kann setast í gildi við teimum broytingum, sum Løgtingið hevur samtykt.

Tríggir møguleikar eru og mælir landsstýrið til: at Løgtingið samtykkir at støðga gildiskomuni av ríkislógini, og ístaðin verður farið undir at gera føroyska lóg um fjølmiðlaábyrgd, sum tingið tekur støðu til, tá uppskotið er liðugt.

– Við hesum møguleikanum taka landsstýrið og Løgtingið sjálvi ábyrgdina av at fáa lóg um fjølmiðlaábyrgd í gildi fyri Føroyar, sigur Høgni Hoydal í viðmerkingunum.

– Samanumtikið skuldi tí verið óneyðugt at farið í politiska og løgfrøðiliga togtogan millum danskar og føroyskar myndugleikar um hetta mál. Spurningurin er, hvat Løgtingið vil við spurninginum um fjølmiðlaábyrgd, og hvussu vit tryggja, at lóggávan verður gjørd og sett í verk eftir Løgtingsins ynskjum.

Samstundis sum hetta uppskot verður lagt fyri Løgtingið, verður uppskot til samtyktar um at heita á landsstýrið um at leggja fyri Løgtingið uppskot til løgtingslóg um fjølmiðlaá-

Konfirmatiónskjólar

Skálabúðin

Dr. Jacobsensgøta 21 • Tórshavn • Tlf. 315315 • Fax 311739